






**Arild Hagen**
*Bakke*
*Venjari hjá Volda, sum hevur knýtt Thomas Hans Rubeksen og Hendrik Rubeksen at hópinum*

**Hvat duga brøðirnir?**
Eg havi hugt at teimum undir venjing, og teir eru dugnaligir fótbóltsspælarar. Teir spæla á fleiri plássum. Thomas Hans er ein ektaður framherji, og Hendrik hevur spælt vinstri bakkur og vongur. Eg royndi Hendrik sum miðvallara í venjingardysti, og tað er áhugavert, haldi eg.

**Hendrik er føroyskur landsliðsleikari. Hvat gevur hann liðnum?**
Hendrik er sera skilagóður, og hann hevur gott eyga fyri spælinum. Hann er sterkur í verjuspælinum. Hann hevur nógvar dygdir.

**Var tú nakrantíð í iva um, at felagið skuldi skriva sáttmála við teir?**
Nei, tað var eg ongantíð.

**Hvørjar eru framtíðarætlanirnar hjá Volda?**
Vit stremba eftir at enda millum fimm tey bestu liðini í fjórðbestu norsku deildini næsta kappingarár. Vit ætla okkum skjótt upp í triðbestu deildina. Tað er stórur munur á teimum deildunum, og tað hendir ofta, at liðini, sum vinna seg upp, flyta skjótt niður aftur í fyrstu royndini. So tað verður ein avbjóðing.

# Spildurnýggjur timburhandil í Havn

## Handil Í morgin letur Fjarðahús upp nýggjan timburhandil á Sandvíkarhjalla

Eirikur Lindenskov

Handilin er í fyrsta bygningin á høgru hond, og samstundis kemur timburhandil í Norðsteymi undir samtakið 360⁰, sum eisini fevnir um eina stóra amboðsdeild, gólvdeild, málingahandil, køksdeild, hvítvørudeild, sjónvarp og stereoanlegg og um stutta tíð eisini eina møbildeild.

- Sum fyrsti timburhandil í landinum er hesin skipaður sum ein Drive in handil, og tað merkir, at bilarnir kunnu koyra beinleiðis inn í handilin og undir taki gera síni ørindir. Hetta er vanligt í uttanlands og er sera lokkandi, hugsa vit um føroyska veðurlagið, sigur Regin Joensen á Fjarðahús.

Hugskotið við 360 í dag er, at tað skal bera til at keypa alt til húsið og til bygningsvinnuna undir einum taki. Meðan timburhandilin er í øðrum bygninginum, er møguleiki fyri at keypa alt tað, tú kanst hugsa tær innan amboð og útbúnað til hús í hinum handlinum.

Fjarðahús byrjaði í Vestmanna sum timburhandil seinast í fimmtiárunum og fór síðan undir at gera lyklaklár hús. Seinni flutti handilin til Kollafjarðar. Eini 400 Fjarðahús standa kring landið. Av tí at so nógv onnur gera hús í dag, vil 360⁰ brúka alla orkuna til at útvega tilfar og útbúnað til hús.

- Okkara føstu kundar í Norðstreymi, Vágunum og aðrastaðni við koma einans at merkja, at tað eru 12 minuttir longur at koyra til okkum. Hinvegin kunnu vit bjóða eina munandi betri tænastu á Sandvíkarhjalla í nýmótans kørmum. Vit vóru noyddir at flyta úr Kollafirði, møguleikarnir at byggja úr vóru vánaligir. Kundagrundarlagið er eisini størri í høvuðsstaðnum soleiðis at vit kunnu menna okkara fyritøku enn meira, sigur Regin Joensen á Fjarðahús.

eirikur@sosialurin.fo

## Í MORGIN

*-1/+2 °C*




Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum -2 og +1 stig.

## SUNNUDAGIN

*-1/+2 °C*




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, seinnaparin minni vindur. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum -1 og +2 stig.

## MÁNADAGIN

*-2/+1 °C*




Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og eystri og sólglottar, men kanska okkurt kavaælið. Hitalagið millumm -1 og +2 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul millum landnyrðing og landsynning og sólglottar, men kanska okkurt vátaslettings- ella kavaælið. Hitin millum 0 og +4 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1004 HPa. við Hetland fer suðureftir og dýpist. Eitt hátrýst, 1045 hPa. eystan fyri Grønland stendur mestsum í stað.




**Komandi nátt:**
Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum stendur í stað og gevur framvegis landnyrðign á okkara leiðum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 127 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

15. nov Mánin longst frá jørðini
21. nov Fullmáni
28. nov Seinna kvarter
30. nov Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. nov | 09:53 | 22:17 | 08:53 | 21:17 | 09:08 | 21:32 | 11:53 | - | 00:28 | 12:53 | 08:08 | 20:32 | 07:08 | 19:32 | 10:08 | 22:32 | 11:08 | 23:32 | 09:38 | 22:02 | 10:53 | 23:17 |
| 27. nov | 10:41 | 23:18 | 09:41 | 22:18 | 09:56 | 22:33 | 00:17 | 12:41 | 01:17 | 13:41 | 08:56 | 21:33 | 07:56 | 20:33 | 10:56 | 23:33 | 11:56 | - | 10:26 | 23:03 | 11:41 | - |
| 28. nov | 11:55 | - | 10:55 | 23:31 | 11:10 | 23:46 | 01:18 | 13:55 | 02:18 | 14:55 | 10:10 | 22:46 | 09:10 | 21:46 | - | 12:10 | 00:33 | 13:10 | 11:40 | - | 00:18 | 12:55 |
| 29. nov | 00:31 | 13:08 | - | 12:08 | - | 12:23 | 02:31 | 15:08 | 03:31 | 16:08 | 11:23 | 23:45 | 10:23 | 22:45 | 00:46 | 13:23 | 01:46 | 14:23 | 00:16 | 12:53 | 01:31 | 14:08 |
| 30. nov | 01:30 | 13:52 | 00:30 | 12:52 | 00:45 | 13:07 | 03:30 | 15:52 | 04:30 | 16:52 | - | 12:07 | 11:07 | 23:31 | 01:45 | 14:07 | 02:45 | 15:07 | 01:15 | 13:37 | 02:30 | 14:52 |